GÍ-EB/Streymur 4-4 (0-2):

# Málrok í linligum dysti

**Áskoðararnir fingu nógv og góð mál í Gøtu sunnudagin, men hetta kundi ikki krógva, at talan var um dyst millum tvey lið, sum lítið og einki høvdu at spæla fyri**

FÓTBÓLTUR

*Jákup Mørk*

*jakup@sosialurin.fo*

Tvær langskotsperlur frá Súna Olsen man fara at verða tað, sum áskoðararnir í Sarpisgerði fara at minnast frá dystinum millum GÍ og EB/Streym sunnudagin.

Tí hóast úrslitið kundi bent á, at talan var um dramatiska og hendingaríka uppgerð, so var tað ikki hetta, sum eyðkendi dystin.

Fyrra hálvleik vóru tað gestirnir, sum vóru omaná leikliga. Ikki minst komst hetta av, at eftiransingarnar hjá gøtumonnum ikki vóru so neyvar, sum tær ivaleyst høvdu verið, um meira enn eitt pláss í miðjuni stóð upp á spæl. Møguleikar spurdust eisini burturúr, men tað var tó eftir eitt GÍ-álop, at hol kom á. Gestirnir vóru skjótir avstað í kontra, har Magni á Lakjuni slapp leysur, og tá hann so spældi inn til Sorin Anghel skuldi hesin at kalla bert rulla bóltin í netið.

Nakað seinni spurdist brotsspark burturúr, tá hornaspark varð sent innfyri. Gøtumenn vóru annars ónøgdir um, at hornasparkið yvirhøvur varð dømt, og ónøgdin var ikki minni, tá brotsspark varð dømt, tí ein gøtumaður skuldi hava nýtt armin.

Hvussu var og ikki, so var Anghel eirindaleysur, tá hann skeyt úr 11 metrum, og við leiðsluni sum førningi kundu teir hjá EB/-Streymi róliga fara til hálvleiks.

### Mistu takið

Og leingi bendi alt á, at talan skuldi gerast um sigur til EB/Streym. Gaman í minkaði Súni Olsen við einum framúr langskoti, men løtu seinni førdu tvey merkisverd mál til, at støðan var 4-1 til gestirnar.

Fyrru ferðina skuldi Marek senda fríspark av nærum miðjum vølli. Ivaleyst ætlaði pólendingurin at senda bóltin innfyri, og í øllum førum roknaði Hallur Hansen í Gøtu-málinum við hesum. Men saman við skotinum kom ein ógvuslig hvirla og lyfti bóltin høgt í málið, meðan Hallur bara kundi hyggja at.

Fjórða málið má GÍ-málverjin tó taka á sín kappa. Eingin vandi tóktist vera á ferð, tá bólturin varð sendur innfyri, men onkursvegna misti málverjin aftur um seg, og so kundi Sorin Anghel uttan stórvegis hóvasták skjóta sítt triðja mál í dystinum.

Og tað var so tað mundu tey flestu halda. Men GÍ vildi tað kortini øðrvísi. Seinastu 20 minuttirnar ella so funnu teir nakað av press-spælinum, sum áður hevur eyðkent liðið, fram, og tá teir hjá EB/Streymi so ikki løgdu nóg nógv fyri í verjupartinum, fall revsingin. At Bárður Olsen sá sítt seinna gula kort stutt eftir at Gidek hevði minkað um munin, betraði ikki um fyritreytirnar, og so setti GÍ av álvara ferð á.

Súni Olsen gav enn eitt dømi um framúr sparkiteknikkin, tá hann úr 25 metrum meddaði eftir málinum. Skotið var gott, men av tvørstongini stakk tað niður á Gunnar á Steig í málinum og so inn í málið.

Og móti dystarenda kom so útjavningin. Krzystof Popczynski royndi seg við stútara, og tá Gunnar bert fekk hálvbjargað hesum, var Bartal Eliasen rætti maðurin á rætta staðnum, og sum so oftani fyrr, so sendi hann við høvdinum bóltin í málið.

### Tvístøða?

Fagnaðurin um málið var sjálvandi stórur, men tað skerst ikki burtur, at hjá GÍ hevur tað verið væl minni at fegnast um í ár, enn tað vanliga plagar at vera har um leiðir.

Í landskappingini er liðið í einum ongamannalandið, har tað hvørki verður fuglur ella fiskur, men vónin fyri europeiskum fótbólti livir tó enn. Hetta hendir, um B36 gerst føroyameistari, men skal hetta bera til, skulu tvinnir lutir uppfyllast. Fyrst og fremst skal B36 vinna grannauppgerðina ímóti HB, og so skal árstalsfelagið vinna seinasta dystin á árinum. Hesin er í Gøtu, og har plagar B36 vanliga at hava tað sera trupult...

Hjá EB/Streymi er støðan á leið tann sama, skilt soleiðis, at liðið hvørki fer niður, ella verður partur av oddastríðnum. Men einki er at ivast í, at hetta eru teir á samansetta liðnum munin fegnari um, enn gøtumenn eru um sína støðu. Og enn kann EB/Streymur klintra longur upp. Eftirverandi dystirnir eru ímóti VB og Skála, og á pappírinum áttu møguleikarnir fyri stigum í øllum førum at verið góðir í hesum uppgerðum.

### Dysturin í tølum

GÍ-EB/Streymur 4-4 (0-2)
0-1: Sorin Anghel
0-2: Sorin Anghel (br.)
1-2: Súni Olsen
1-3: Marek Wierzbicki
1-4: Sorin Anghel
2-4: Zdzislaw Janik
3-4: Súni Olsen
4-4: Bartal Eliasen

# Endiliga eydnaðist tað hjá Skála

**Einki veiggj var í vágbingum í 1. hálvleiki, og tá ið teir í seinna umfarinum royndu at taka seg saman, megnaðu teir ikki at spæla seg til upplagdar møguleikar**

SKÁLA–VB

*Jóannes Hansen*

*joannes@sosialurin.fo*

Endiliga eydnaðist tað hjá Skála. Eftir tap omaná tap síðani heimasigurin á FS Vágum 2. juli, eydnaðist tað at fáa fult, tá ið vágbingar vitjaðu.

Í útgangsstøðuni hevði Skála fimm á miðvøllinum, meðan Jónhard Frederiksberg var einsamallur í fremstu røð. Skálamenn fingu nógv pláss at spæla á, og serliga í 1. hálvleiki vóru teir greitt omaná. Vágbingarnir vóru eisini væl mannaðir á miðvøllinum, men teir vóru sera tamir. Teir góvu heimamonnunum heilt langar teymar, um tað yvirhøvur ber til at tosa um teymar í hesum sambandinum, og teir arbeiddu ikki nógv. Tað tóktist, sum um hugurin at spæla ikki var nakar serligur, og harvið kundi tað bent á, at miseydnað kappingarár líka sum var lagt afturum, áðrenn tað átti at havt verið tað.

Skála skoraði eitt mál, tá ið fyrra umfarið var gott og væl hálvrunnið. Tað vísti seg at verða sigursmálið. Julian Floresco var meistari fyri málinum. Hann setti álop í gongd aftarlaga í vinstru, Hanus Thorleifsson á miðvøllinum sendi út aftur í borði, har Julian var komin langt fram, hann var púra leysur, megnaði at draga inn í brotsteigin, og smekkaði flatt í handara síðunetið.

Skála spældi seg til fleiri aðrar møguleikar, men Bjarni Johansen var sum ikki eina ferð knassi í VB málinum, og so vóru skálamenninir enn eina ferð ikki nóg avgjørdir, tá ið teir høvdu komið sær í góðar støður í brotsteiginum hjá mótstøðumonnunum.

VB hevði onga skotroynd ímóti mótstøðumálinum í 1. hálvleiki. Dan Djurhuus legði eina ferð innfyri. Eingin vandi var á ferð, men tað kundihavt verið heilt álvarsamt hjá heimaliðnum, um onkur mótstøðumaður hevði verið nóg vakin, tá ið Eugen Voda, sum var komin aftur í Skála málið at standa, fór skeivur av innlegginum.

### Bjargaðu á strikuni

Eftir steðgin var viljin størri í VB avrikinum. Vágbingarnir fóru við størri hugi í nærdystirnar, og teir komu ikki so sjáldan í nánd av brotsteiginum hjá mótstøðumonnunum. Royndirnar ímóti málinum eftur uppspæl vóru fáar og smáar, men onkrar ferðirnar var tað eitt sindur vandamikið í sambandi við fríspørk og hornaspørk. Tvær ferðir fingu vágbingar bóltin inn um málverjan, men á strikuni bjargaði Ronni Hansen, eftir at fremstu VB menninir, Brian Andersen og Birgir Jørgensen, høvdu roynt seg.

Skála hevði eisini sínar møguleikar, men úrtøkan var, sum hon plagar at vera. Tað kundu bæði Alexander Johansen og Bogi Gregersen skriva undir uppá hesa ferð.

Eftir at FS Vágar fekk trý stig, eru vágbingar komnir í støðu, sum eigur at bera við sær, at teir tvær tær næstu ferðirnar fara at stríðast fyri at sleppa undan endaspæli. Teir skulu til Eiðis, áðrenn teir runda av á heimavølli ímóti B68. Um Skála vinnur bæði í 17. og í 18. umfarinum, so fara teir ivaleyst at lyfta sær upp á næstaftasta plássið. Lykladysturin verður nú sunnudagin í Miðvági, áðrenn Skála fær vitjan av EB/Streymi. Um Skála vinnur ímóti FS Vágum kunnu teir bjarga sær við sigri á heimavølli ímóti EB/-Streymi, um FS Vágar ikki megnar meiri enn javnleik í Runavík.

Niklas á Líðarenda var uppmaður á Skála, har líkindini vóru sum allar aðra staðni. Mest merkisvert við dómaranum var tað, tá ið luftin í 1. hálvleiki fór úr honum. Eftir at hann hevði bríkslað fyri frísparki til VB, smekkaði ein skálamaður til bóltin, sum rakti í krovið á dómaranum, ið small um. Men bara eina lítla løtu, so var hann á fótum aftur og røkti uppgávuna alla tíðina.

### Skála–VB 1–0 (1–0)

1–0: Julian Floresco
**Dómari:** Niklas á Líðarenda








HB-B68 2-0 (1-0):

# HB hevði nógv størri álopstyngd enn toftamenninir

**Við einføldum kontraspæli var HB greitt omaná ímóti B68, sum ongantíð megnaði at skipa miðvallarspælið soleiðis, sum teir hava gjørt nógvu tær undanfarnu ferðirnar**

FÓTBÓLTUR

*Jóannes Hansen*



*Stóri trupulleikin hjá B68 var hesaferð, at miðvøllurin ongan tíð kom veruliga ígongd, og tað dugdi teir í HB at gera sær dælt av*

*Mynd: Finnur Justinussen*

Tá ið tað mest galt um hjá bæði HB og B68, vóru tað toftamenninir, sum dumpaðu við einum braki, meðan HB stóð royndina við einum glansi.

B68 hevði í viðførinum í Gundadal sjey sigrar á rað, sum fyrst og fremst vóru vunnir, tí liðið hevði víst sannførandi, hugflogsríkt og álopskent miðvallarspæl.

HB syrgdi fyri, at B68 ætlanirnar við støði í nógvum teimum undanfarnu umførunum hesa ferð duttu sundur, og so høvdu gestirnir av Skálafjørðinum einki at bjóða uppá. Tá ið Birgir Sondum bríkslaði fyri síðstu ferð, kundi staðfestast, at B68 onga roynd hevði havt á HB málið burtursæð frá í 2. minutti, tá ið Jóhan Petur Poulsen sneiddi framvið annars arbeiðsleysa Bárði Johannesen, men vinkulin úr høgru gjørdist spískur, og skotroyndin var lættliga bjargað frammanfyri fremra stólpan.

HB hevði gjørt heimaarbeiðið. Í ásannan av at teir í útgangsstøðuni neyvan kundu spæla upp ímóti landsliðsmonnunum á B68 miðvøllinum, royndu teir – og tað eydnaðist væl – at spæla uttan um og serliga upp um sentralu mótstøðumenninar. Rógvi Jacobsen og Tór–Ingar Akselsen høvdu sum fremstu HB menninir tyngdina, sum skuldi til, og sum B68 álopið bara hevði ein farra av síðstu løtuna, tá ið Øssur Jacobsen var komin á vøllin. Rógvi og Tór–Ingar megnaðu at temja, varðveita, draga, seta ferð á og at sleppa bóltinum akkurát, tá ið tað skuldi gerast. Á verjukendu miðvallarplássunum vóru Martin Christensen og Kári Nielsen bylgjabrótarar, meðan Nicu Dogaru og serliga Rúni Nolsøe støðugt lógu framvið at stuðla álopsmonnunum, eftir at langar sendingar vórðu lagdar, og hetta hevði fleiri ferðir við sær, at B68 verjan, sum annars hevur verið sum kletturin nógvu tær undanfarnu ferðirnar, tóktist kroyst, og Hans Fróði Hansen var ikki so sannførandi, sum hann hevur verið største partin av árinum.

Tvær deyðbóltsstøður vóru upprunin til tey bæði HB málini, og álopsparið Tór–Ingar Akselsen og Rógvi Jacobsen vóru báðu ferðirnar rættuliga sentralir. Tað fyrra stútaði Rógvi Jacobsen, tá ið eitt korter var farið. Frísparksroynd frá Tór–Ingar úr vinstru varð blokerað til horna í høgru, Tór–Ingar sendi innfyri, og Rógvi stútaði mitt fyri málinum í bleytum boga mitt í málið. Støðan var rættuliga átøk henni, tá ið Jann Ingi Petersen hjá B68 mánakvøldið skoraði ímóti NSÍ. Støðan tóktist lítið vandamikil, men bólturin slapp at sigla í málið, tí Albert Sævarsson var so óheppin at missa fótafestið.

Tór–Ingar Akselsen skoraði seinna málið, tá ið ein tími var farin. B68 verjan var heilt óskipað, tá ið Rógvi Jacobsen skundaði sær at tveita innkast nakrar metrar frammanfyri miðstrikuna í høgru. Tór–Ingar Akselsen megnaði at halda Hans Fróða Hansen aftan fyri seg, og tá ið Albert Sævarsson kom út ímóti, megnaði hann bara at taka ferðina eitt sindur av bóltinum, sum stiklaði inn um málstrikuna, og harvið var tað greitt, at øll stigini fóru at verða eftir í Gundadali.

### Ongantíð undir trýsti

Fleiri ferðir fyrr í summar hevur verið eyðsæð, at dygdirnar í framrættaða spælinum hjá HB hava verið størri, enn tær hava verið í verjupartinum. Uppskriftin hjá B68 átti at havt verið at leggja trýst á aftastu HB ketuna, sum er mannað við ikki skjótastu spælarunum, men sum oftast hevur staðið seg, tí har eru tryggir bóltspælarar, sum hava nógvar royndir.

B68 megnaði so at siga ongantíð at kroysta Jan C. Dam og hinar í HB verjuni. Teir vóru avgjørdir og sparkaðu langt, um ein ráki av trýsti kendist. Fremstu B68 menninir høvdu ikki stóra tyngd, teir fingu sjáldan tak á støðuni, og miðvallararnir náddu sjáldan fram at stuðla teimum.

Sammett við eitt nú ímóti FS Vágum og NSÍ var B68 spælið ein skuggi av sær sjálvum. Fyrsta tíman megnaðu teir ikki so sjáldan at finna hvønn annan, men teir høvdu ikki framdriftina, hugflogið og tyngdina, sum teir áður hava havt. HB spælararnir útstrálaðu størri vilja og vunnu flestu nærdystirnar, og tá ið Øssur Hansen eftir ellivu minuttir í 2. hálvleiki noyddist at taka seg av válinum, tí lærkrikin argaði, og HB tríggjar minuttir seinni hevði økt til 2–0, var spenningurin burtur.

HB hevði longu tríggjar minuttir undan steðginum havt gyltan møguleika at økja til 2–0. B68 verjukiks hevði við sær, at Tór–Ingar Akselsne kom ígjøgnum og varð feldur, men Albert Sævarsson bjargaði flata brotssparkinum hjá Rógva Jacobsen. Eftir 2–0 málið hevði HB fullkomuliga tamarhald á støðuni. B68 royndi at spenna álopsbogan, og tað kostaði í eftiransingunum, uttan at álopsparturin fekk størri tyngd. HB broderaði, og í snarálopum kundu teir havt skorað bæði tvey og trý mál afturat. Men fleiri ferðir duttu teir í rangstøðufelluna, og onkra ferðina bjargaði Albert Sævarsson rættuliga væl.

Men tað mundu HB'ararnir á og kring vøllin einki hava ímóti. Teir høvdu sett B68 miðvøllin út av spælinum, teir høvdu góðar spælarar í fremstu røð, sum megnaðu tað, ið tað er rímuligt at rokna við, at álopsspælarar gera, B68 hevði ongantíð megnað at lagt trýst á HB verjuna, og tí var 2–0 heimasigurin væl og virðiliga uppiborin.

### Dysturin í tølum

**HB–B68 2–0 (1–0)**
1–0: Rógvi Jacobsen 15.
2–0: Tór–Ingar Akselsen 60.
**Dómari:** Birgir Sondum
**HB:** Bárður Johannesen – Hallur Danielsen, Jan C. Dam, Símun Eliasen, Janus M. Joensen – Kári Nielsen (Bjarni Jørgensen, 79.), Rúni Nolsøe, Martin Christiansen, Nicu Dogaru (Rókur Jespersen, 86.) – Tór–Ingar Akselsen, Rógvi Jacobsen
**Gult kort:** Martin Christensen 90.
**B68:** Albert Sævarsson – Dánial Hansen, Hans Fróði Hansen, Arnbjørn Danielsen, Jákup Eli Olsen – Bogi Petersen (Øssur Jacobsen, 74.), Jann Ingi Petersen, Fróði Benjaminsen, Øssur Hansen (Mannbjørn Nesá, 57.) – John Heri Dam, Jóhan Petur Poulsen (Jákup Djurhuus, 84.)
**Gult kort:** Jann Ingi Petersen 21., Fróði Benjaminsen 23.